# Jenis av Rana er við at missa tolið

*Hendir onki í fullveldismálinum heilt tíðliga í heyst, fer hann at leggja uppskot fyri tingið um at halda fólkaatkvøðu um fullveldi, og hon skal vera sum skjótast*

Áki Bertholdsen

–Nú kunnu vit ikki bíða longur. Tí má fullveldismálið avgreiðast, ongantíð ov skjótt.

Jenis av Rana, løgtingslimur fyri Miðflokkin og limur í Uttanlandsnevndini hjá løgtinginum er við at missa tolið við fullveldismálinum.

Hann sigur at fullveldismálið hevur køvt alt annað samfelagskjak og alla aðra politiska viðgerð í Føroyum nú í tvey ár.

– Hesi seinastu árini er øll politiskt og fyristingarlig orka brúkt upp á fullveldið ímeðan øll hini samfelagsmálini lítla og onga viðgerð hava fingið og tað kann ikki halda fram.

– Nú má fullveldismálið avgreiðast ongantíð ov skjótt, so at vit sleppa víðari at loysa øll hini málini, sum liggja á láni, sigur løgtingsmaðurin fyri Miðflokkin.

### Uppskot fyri tingið

Jenis av Rana sigur, at hendir onki í fullveldismálinum nú, fer hann sjálvur at gera sítt til, at tað kann vera avgreitt ongantíð ov skjótt.

Tí ger hann nú púra greitt, at hendir ikki eitt avgerðandi frambrot í fullveldismálinum heilt tíðliga í heyst, fer hann at leggja uppskot fyri tingið um at halda fólkaatkvøðu um føroyskt sjálvstýrið.



*–Tað er næstan pínligt at landsstýrið blívur við at biðja danir um samráðingar um fullveldi, tí nú koma vit ikki longur, sigur Jenis av Rana.*

Og hendan fólkaatkvøðan skal vera sum skjótast, heldur hann.

Hann heldur, at løgmaður hevur eina løgna støðu, tá ið hann sigur, at málið verður ikki lagt fyri fólkið, fyrrenn vissa fæst fyri, at tað verður samtykt.

– Hetta er sami taktikkur, sum ES viðhaldsfólk í Danmark brúka. Vænta tey sær ikki undirtøku, bíða tey bara til veljarakanningar vísa, at rákið vendir og so leggja tey málini til fólkaatkvøðu.

– Men einaferð má løgmaður verða mannfólk nokk til at siga við Føroya fólk, at hetta er úrlitið vit komu til, takið nú tit støðu.

– Fellur málið er ein nýggj støða og so arbeiða vit víðari útfrá tí.

### Vit koma ikki víðari

Og tað skilst á Jenisi av Rana, at hann er at kalla fullvísur í, at fullveldismálið kemur ikki longri, enn tað er komið nú.

Hann heldur, at á seinasta fundinum í Keypmannahavn varð nógv greidd, sum kanska ikki varð so greitt frammanundan

Hann heldur at tað týdningarmesta málið at loysa, er júst skiftistíðin.

–Men har mugu vit ásanna, at vit koma ikki longri.

Tað hava nú verið tríggir samráðingarfundir og teir hava víst, at danska stjórnin er ikki at vika í hesum máli.

Jenis av Rana sigur, at tí er bara eftir hjá føroyingum at at sláa seg til tols við, at skiftistíðin verður ikki longri enn fýra ár.

– Og so er onki at gera, uttan at leggja vit fullveldismálið fyri fólkið at taka støðu til útfrá, tí nú eru samráðingarmøguleikarnir á politiskum stigi, uppi.

Hann heldur øll hini viðurskiftini ímillum Føroyar og Danmark eru ikki truplari at loysa enn so, enn at tey hoyra heima á embætismannastigi, tí tað eru í veruleikanum smálutir.

– Bæði spurningurin um heilsumál, útbúgvingarmál og annað, eru mál, sum embætismenn hjá báðum londum fáa loyst við samráðingum.

– Eg haldi eisini, at danir hava týðiliga boðað frá, at teir eru sinnaðir at samstarva við føroyingar á øllum hesum økjunum, hóast vit taka fullveldið

### Fullvísur fullveldismaður

Sjálvur ivast hann ikki í, at atkvøða „ja“ fyri fullveldinum, tá ið málið verður lagt til fólkaatkvøðu, hóast skiftistíðin bara verður fýra ár.

– Eg ivist onga løtu í, at vit klára okkum sjálvi, hóast vit bara hava eina skiftistíð upp á fýra ár.

Men hann leggur dent á, at hetta er hansara egna støða.

– Hvat vit fara at mæla veljarunum hjá Miðflokkinum til, vita vit ikki enn.

– Tann spurningurin skal viðgerðast í flokkinum, tá ið eitt samráðingarúrslit fyriliggur.

– Sjálvandi fari eg at verða trúgvur ímóti teirri avgerðini.

– Men tað er ongin ivi um, hvar mín krossur verður settur.

### Blokkurin vekk undir øllum umstøðum

Jenis av Rana sigur, at hartil kemur, at danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen boðaði greitt og týðiliga frá á tíðindafundinum eftir samráðingarnar tann 15. juni, at danska ríkisveitingin til Føroyar fer at verða skerd undir øllum umstøðum, um livistøðið í Føroyum fer uppum tað danska.

Longu nú er livistøðið í Føroyum farið upp um livistøðið á Bornholm og á Storestrøms Amt.

– Sostatt endurtók hann tað, sum danski fíggjarmálaráðharrin, Mogens Lykketoft, hevði gjørt føroysku samráðingarnevndini greitt á sjálvum findinum.

—Aftaná hava so aðrir roynt at taka orðini aftur, men tað skerst ikki burtur, at danska stjórnin metti fíggjarligu støðuna í Føroyum so, at blokkurin fer at minka undir øllum umstøðum.

*Stendur so valið hjá føroyingum í veruleikanum ímillum eitt fullveldi við ongum blokki, ella eitt heimastýri við ongum blokki?*

–Í hvussu so er eitt heimastýri við, sum ikki fær tann blokkin, sum tað fær í dag.

Hann kann skjótt hvørva, leggur Jenis av Rana afturat.

# Beinleiðis samráðingar ímillum Føroyar og NATO um herstøðina

*–Tað er ongin orsøk til, at Danir skulu fáa fíggjarligan vinning burturúr at NATO hevur støð í Føroyum. Tann peningin skulu vit sjálvir hava, sigur Jenis av Rana*

Áki Bertholdsen

–Føroyingar skulu taka upp beinleiðis samband við NATO.



*–Føroyski fólkaviljin er, at NATO skal úr Føroyum. Men skal herstøðin verða her, skulu vit hava vinningin*

Tað heldur í hvussu so er Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri Miðflokkin og limur í uttanlandsnevndini hjá Løgtinginum.

Hann dugir tískil ikki at síggja meiningina við at Landsstýrið blívur við at gera herstøðirnar í Føroyum til eitt mál í fullveldissamráðingunum við danir.

–Danska stjórnin noktar at tosa um herstøðirnar. Og hví skulu vit plága teir við einum máli, sum teir ikki vilja tosa um, spyr Jenis av Rana.

Hann heldur, at ístaðin er tað so sjálvsagt, at føroyingar sjálvir venda sær beinleiðis til NATO og spyrja verjufelagsskapin, hvat ætlanin er við herstøðunum í Føroyum og hvat teir ætla, um Føroyar taka sjálvstýri og um teir tá ætla at verða verandi.

–Tað er pínliga greitt, at vit koma ikki longur í samráðingum við danir, tí teirra støða er greið. Og tí eiga vit venda okkum beinleiðis við NATO.

Jenis av Rana sigur, at vit mugu ikki gloyma, at tað er í Føroyum at herstøðirnar eru.

Sjálvur ivast hann ikki í, at júst spurningurin um herstøðirnar verður eitt avgerðandi spurningur á fólkaatkvøðuni, sum verður um fullveldi.

Sjálvur ivast hann nevniliga ikki í, at støðin í Føroyum eru ein fíggjarligur spurningur. Og vil NATO avgjørt hava støðirnar í Føroyum, so er tað ongin orsøk til at danski staturin fer við tí fíggjarliga vinninginum, tí hann skulu vit hava sjálvir.

Tó minnir hann eisini á, at Løgtingið hevur tríggjar ferðir samtykt, at herstøðirnar skulu ikki vera í Føroyum og at tann fólkaviljin skal eisini virðast.

Men hartil vísir hann eisini á, at sjálvurt ivast hann ikki í, at NATO støðin hevur alstóran hernaðarligan týdning.

– Alt annað er barnslig hugsan. Skjótt hava vit ein felags Evropaher, so tað trongist samanum hjá russarum allastaðni. Og skjótt hava teir ongan annan veg út í Atlantshav, uttan norðaneftir, beint framvið Føroyum.



# Fiskasølan keypt part av Va›horn

*Kappingin um ráfiskin har›nar meir og meir. Føroya Fiskasølu, i› higartil bert hevur selt fisk, er nú farin at vísa framlei›sluni og vei›ili›num størri áhuga*

Dia Midjord

Fyri kortum keypti Føroya Fiskasøla smápartafelagi› H. D. Bókhald, i› eigur 25 prosent ella ein fjór›ing av partapeninginum í saltfiskavirkinum Va›horn Seafood á Strondum.

Árni Arge, fíggjarstjóri á Føroya Fiskasølu, sigur, at Fiskasølan er áhuga› í sjálvum saltfiskakonseptinum hjá Va›horn. Hann vísir á, at umframt at hava eitt væl rikii› virki og eina dygdarvøru, so eigur felagi› eisini part í tveimum skipum.

– Ta› er trupult at fáa fatur á fiski í dag, og tí vilja vit gjarna kn‡ta okkum tættari at nøkrum virkjum, sigur Árni Arge.

– Ta› kemur ikki upp á tal, at Fiskasølan fer í holt vi› framlei›slu, tí tann førleikan hava vit ikki. Men fyri at tryggja ney›ugu rávøruna í framtí›ini, hava vit víst framlei›slu- og vei›ili›num størri áhuga, sigur hann.

### Eigarin nøgdur?

Hóast Fiskasølan og Fiskavirking hava sama eigara, ver›ur líti› gjørt vi› samstarv millum partarnar. Fyri nøkrum árum sí›an seldi Fiskasølan meir enn 60 prosent av framlei›sluni hjá Fiskavirking, men sølan er nærum minka› burtur í einki í dag.

Fyri at tryggja sær rávøru í framtí›ini, hevur Fiskasølan so leita› sær n‡ggjar lei›ir. Ta› virkar kortini løgi›, at Fiskasølan er noydd at fara inn á øki› hjá systurfelagnum Fiskavirking. Og hetta kann neyvan vera ta› mest gevandi fyri eigaran Framtaksgrunnin.

# Leivur ræ›ist lánipening

*– Vit mugu ikki brúka meir, enn vit fáa inn í kassan, sigur b‡rá›sforma›urin og sipar til áttatiárini, tá kommunan lænti pening til íløgur*

Dia Midjord

Hóast ta› hevur gingi› væl hjá Tórshavnar kommunu í nøkur ár, so ávarar b‡rá›sforma›urin ímóti vælfer›ini.

– Vit mugu ikki gloyma, at Tórshavnar kommuna vi› árslok framvegis hevur einar 300 skuldarmilliónir. Ta› gongur rætta vegin, men enn eru vit ikki sloppin úr trupulleikunum, sigur Leivur Hansen, b‡rá›sforma›ur í Havn.

Vit skulu óiva› langt aftur í tí›ina, kanska til áttatiárini, at finna ein roknskap, har skuldin hjá kommununi er lægri enn inntøkan frá skatti. Vi› árslok er skuldin einar 300 milliónir og skattainntøkan einar 340 milliónir krónur.

### 30 mió. aftrat

Tølini í ársroknskapinum hjá Tórshavnar kommunu fyri farna ár vísa eisini, at ta› stendur rættiliga væl til. Kommunan fekk 25 milliónir meir inn í persónskatti og 5 milliónir meir í partafelagsskatti.

31. desember 1995 hev›i kommunan gó›ar 6 milliónir í tøkum peningi at brúka. Gjaldføri›, i› hetta ver›ur kalla›, liggur í dag um 100 milliónir krónur.

Í mars brúkti kommunan 50 milliónir av hesum at gjalda ni›ur eitt eykagjald av lániskuldini.

### Kunnu standa ímóti

– Okkara meining er, at ein kommuna av slíkari støðd, eigur at hava einar 30-40 milliónir í kassanum at standa ímóti vi›, um okkurt óvænta› og átrokandi tekur seg upp, sigur b‡rá›sforma›urin.

Nógvur byggiaktivitetur er at síggja ymsasta›ni í Havnini. Eru tit longu farnir at dansa um gullkálvin?

– Nei, ta› eru vit ikki. Alt, sum er í gongd, eru arbei›i, har peningur er settur av á fíggjarlógini, sigur b‡rá›sforma›urin.

Tá tit hava so stórt avlop, hví byggja tit ikki eina risastóran barnagar› til eini 200 børn?

– Ta› er ikki so einfalt at fáa bilbukt vi› ansingartørvin. Vit hava seinastu f‡ra árini útvega› 380 n‡ggj pláss, men hetta er tíverri ikki nokk. Tørvurin er so ómetaliga stórur, sigur Leivur Hansen.

### Ikki rætta tí›in

Ta› skurrar í oyrunum hjá b‡rá›sformanninum, tá vit nevna skattalætta. Hann heldur ikki, at hetta er rætta tí›in.

– Vit hava 300 milliónir í skuld og hetta skal helst burtur, á›renn vit geva skattalætta, sigur hann.

– Ta› er ikki serliga heppi› at seta skattin ni›ur og so seinni finna útav, at hetta ikki ber seg. Seta vit skattin ni›ur, so ver›ur ta› ikki broytt vi› bræ›i.

Leivur Hansen vísir eisini á, at skattalætti í Havn, kann hava negativar fylgjur.

– Fólk í bygdum har skattaprosenti› er høgt, ynskja kanska at flyta til høvu›sta›in. Fáa vit tilflytarar at hesu ávum, mugu vit útbyggja skúlar og barnagar›ar. Og hetta klárar neyvan eitt so lágt skattaprosent, sigur b‡rá›sforma›urin.



*B‡rá›sforma›urin veit væl, at ta› gongur væl hjá Tórshavnar kommunu, men vísir á, at kommunan framvegis hevur 300 mió. krónur í skuld at dragast vi›*


HEIMA BIO



The Haunting



Blue Streak

VIDEOTOP 10

VIKA 26

1 American Pie
2 Blue Streak
3 007 - The World is Not Enough
4 The Haunting
5 Mickey Blue Eyes
6 Fight Club
7 Instinct
8 End of Days
9 Teaching Mrs. Tingle
10 The Ninth Gate

| | |
|---|---|
| Í Gundadali | tel. 31 47 70 |
| Í Kollafirði | tel. 42 10 83 |
| Í Saltangará | tel. 44 91 33 |
| Í Klaksvík | tel. 45 73 53 |
| Í Sørvági | tel. 33 20 01 |
| Í Leirvík | tel. 44 33 60 |
| Í Skálafirði | tel. 44 12 00 |

STATOIL

støðirnar kring landið

petur & petur 320870